DAGSINS MEINING

Ivasom framferð

Vit hava seinastu dagarnar hoyrt og lisið um ráðstevnuna, sum Norðuratlantsbólkurin hevur skipað fyri á fólkatingi. Eisini Sosialurin var við til at dekka stevnuna. Nú aftaná er rætt at steðga á og opið og sakliga at seta spurningar. Eisini til sjálvrannsakan. Eingin kann nokta Norðuratlantsbólkinum á fólkatingi at halda tær ráðstevnur, ið bólkinum lystir. Ráðstevnur kunnu vera bæði gagnligar og upplýsandi. Hinvegin eru nakrar spælireglur í føroyskum politikki, sum ikki eiga at verða brotnar, uttan mun til hvussu freistandi, tað enn er. Tað hevur alt tað, vit vita, verið ein óskrivað meginregla, at føroyskir fólkatingsmenn, staddir í Danmark, eru loyalir móti einumhvørjum sitandi landsstýri. Tað hevur verið siðvenja, at føroyskir fólkatingsmenn nýta ikki sín fólkatingssess til tess at seta danir upp ímóti politiskum mótstøðumonnum í Føroyum. Tað hevur higartil verið siðvenja, at føroyskir fólkatingsmenn vinna sær ikki politiskar fyrimunir á fólkatingi undir umstøðum, har politiski mótstøðumaðurin- ella flokkurin ikki fær vart seg.

Gamla orðið, sum sigur "Tað er ringur fulgur, ið drýtur í egið reiður", hevur verið ein góð meginregla, og tað kann staðfestast, at fólkatingslimir til hendan dag hava livað upp til hetta gamla orðið. Tað bar altíð til at boða frá sínum ósemjum og tað hevur altíð verið sigur, at føroyskir fólkatingsmenn markera síni sjónarmið, eisini tá hesi vóru í andsøgn við rikna politikkin í Føroyum. Men hagani frá og so til, at skipa fyri ráðstevnu við tí endamáli aktivt at má støðið undan politikkinum hjá eini samgongu heima, soleiðis sum hetta verður lagt upp, er ov langt lop. Blokkurin ella heildarveitingin er ein spurningur, sum skal gerast av her heima í Føroyum á Føroya løgtingi. Hetta er eitt hitt størsta politiska málið hjá sitandi samgongu. Tað er tí ikki fair at fara aftur um bakið á løgtingsmeiriluta og landsstýri at ávirka danir í einum máli, har sitandi samgonga hevur ein heilt annan og púra greiðan politikk. Tað er stórur meiriluti á tingi og millum manna fyri at varðveita blokkin. Er tað so ikki eitt sindur illoyalt av andstøðuni at arbeiði aktivt móti hesum politiska vilja fólksins uttan fyri landoddarnar? Kann verða spurt. Men lat okkum bara fáa eitt orðaskifti um blokkin, uppá gott og ilt. Ikki ikki bert sæð frá tí einu síðuni.

Ráðstevnan hjá Norðatlantsbólkinum er ein greið markering av, at einki samstarv av álvara verður millum andstøðu og samgongu. Andstøðan hevur við álopinum á blokkin niðri í Danmark av álvara lagt sjógv millum seg og samgonguna. Hetta kunnu fólk harmast um ella fegnast um alt eftir lyndi og politiskum liti. Eftir stendur, at andstøðan, hóast alt hetta ivaleyst er gjørt við hinum besta vilja í eygum hjá mongum, er komin at standa sum ein illoyal andstøða. At verða mett sum ein illloyal andstøða er nakað av tí versta, sum kann henda fyri eina andstøðu. Tað er eisini sera ósunt fyri fólkaræðið og álitið millum flokkarnar á tingi. Vit hava brúk fyri bæði samgongu og andstøðu, og hóast hesar stríðast hvør fyri sínum áhugamálum, so mugu hesar royna at liva upp til tær demokratisku, skrivaðu og óskrivaðu reglarnar, sum galda.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fólkaræðið vunnið í Tórshavnar býráð

Elin Lindenskov
býráðslimur
www.lindenskov.com

Minnilutin kærdi í februar 2003 meirilutan í Tórshavnar býráð til kommunala eftirlitið. Vit kærdu fyri teirra arbeiðshátt, sum als ikki virdi fólkaræðið.

Meirilutin vildi ikki leggja stórmál fyri býráðið at taka støðu til. Tey vildu avgreiða eitt nú bygging av barnagørðum og øðrum stórum ætlanum í nevndum - uttan um býráðið.

Dømi, vit kærdu um, kostar skattborgarunum 10,5 mió. kr.

Meirilutin ætlaði at avgreiða málið í mentamálanevndini, uttan at leggja málið fyri býráðið.

Minnilutaumboðið í nevndini kravdi málið til atkvøðugreiðslu á býráðsfundi, men tað skúgvaði meirilutin av borðinum og avgreiddi málið sum kunningarmál.

Innlendismálaráðið hevur nú svarað okkum. Vit hava fingið viðhald, og harvið vunnið fólkaræðið aftur í býráðnum.

Vit í minnilutanum løgdu dent á, at vit ikki kunna góðtaka, at 5 av 13 býráðslimum skulu taka avgerðir í stórmálum. Hetta er minni enn helmingurin av fólkavaldu umboðunum.

Við at flyta málini úr býráðnum í nevndir at avgera, vildi meirilutin krógva málini fyri borgarunum. Borgarin fær jú ikki innlit í nevndararbeiðið. Tað er bara býráðsarbeiði, sum er alment.

Tað ber ikki til at siga annað um ætlanina hjá meirilutanum, enn at tey ætlaðu at skúgva fólkaræðið til viks.

Vit í minnilutanum eru fegin um, at vit við okkara klagu, hava fingið fult viðhald í okkara pástandum, og harvið hevur fólkaræðið aftur vunnið ein sigur í býráðnum.

Búskaparfrøðingarnir Herman Oskarsson og Jóannis Jacobsen

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Hvat er tað fyri ljós, sum tit hava sæð tá tað snýr seg um føroyskan búskap og burðardygd, sum vit vanligu menniskju ikki hava fingið opinberað enn??

Eg má siga at tað er heilt ótrúligt, at tveir so lærdir menn, fullir av búskaparligum teorinum, skulu sleinga um seg við so nógvum reinum vrøvli, sum vit hava lisið og hoyrt hesar seinastu dagarnar.

Vit hava eina høvuðsvinnu – fiskivinnuna, sum er grundarlagið undir okkara samfelag og burtur úr hesi berandi vinnu spretta hjávinnur og servisvinnur av ymsum slag á landi.

Sambært hesum báðum frøðingum, so er fiskivinnan als ikki neyðugur, skil tað hvør, ið kann, men eg skilji tað so ikki .

Sigið okkum hvørjum vit skulu liva av í framtíðini – tit sýnast at hava loysnirnar.

Arðar alternativar vinnur verða ikki bygdar upp dag frá degi í einum landi sum Føroyum við okkara fjarstøðu frá meginlandinum, men tit hava kanska okkurt kort í ermuni hesum viðvíkjandi?

Er tað t.d. rætt at nýta makro økonomiskar teoriir, sum eru bygdar upp á ein búskap sum t.d. tann amerikanska, sum stórt sæð livir av at selja til sín sjálvan við einum heimamarknaði uppá 95% av øllum tey framleiða, mótvegis okkum sum mugu útflyta 98% av allari okkara framleiðslu?

H.Oskarsson segði seinasta heyst, at vit kundu senda allan fiskin til Kina heldur enn at halda liv í lortinum (gangi út frá at hann meinti fiskivinnuna) nøkur ár enn, og nú sigur J. acobsen, at vit kunnu eins væl bara halda áfram at keypa í SMS og lata fiskivinnuna sigla sín egna sjógv, tí vit liva eins væl álikavæl??

Gud hjalpi mær, um ikki H. Oskarsson aftur nú, tann 25.05.04 í danskari útvarpssending, sum formaður í Búskaparráðnum útbasunerar, at blokkurin bara er til skaða fyri okkara føroyingar og at vit als ikki brúka hann, men senda eina milliard uttanlands um árið.

M. a. sigur Oskarsson at, citat:

»De ved ikke hvad bloktilskuddet skal bruges til, og derfor eksporteres det videre til udlandet« citat endað, - nei álvaratos Herman, hvat hugsar tú fyri tær at koma við slikum upp-áhaldi, tú skyldar øllum føringum eina frágreiðing og ikki minst teimum sum umsita blokkin og umsitingini.

Eisini sigur hann millum linjurnar, at øll eru ódugilig og haldi eg at hetta er so langt úti, at tað eigur at fáa fylgjur fyri mannin, sum í hesum høpi tosar sum tann alment valdi føroyski »vísmaðurin« í Búskaparráðnum.

Eg má spyrja, er tað er eitt samt búskaparráð sum kann taka undir við slíkum úttalinsum frá formanni tess.

Er veruliga hugsanin millum limirnir í búskaparráðnum, at Fiskivinnan er nærmast ein trupulleiki fyri samfelagið Føroyar og ríkisveitingin somuleiðis?

Um so er, ert tað er ongantíð ov skjótt at avtaka Búskaparráðið, tí tað er samfelagsskaðiligt.

Oskarsson - sýnist mær at verða føddur provokatørur ella kanska meira og meira sannlíkt, eitt politiskt amboð fyri einum ávísum politiskum máli.

Búskaparfrøðingarnir tosa javnan og savnan um tillagingar, at vinnan skal tillagað seg osfr., men loysnir tær sær man lítið til frá tykkara síðu, men sjalvandi - tað er ikki tykkara uppgáva, so leingi tit kunnu rópa upp um, hvussu alt skal verða og hvussu tað ikki skal verða uttan ábyrgd, ja so er lívið jú so sera einkult og lætt.

Tit báðir og ivaleyst arðir alment ansettir frøðingar høvdu havt sera gott av at komið út í tað veruliga lívið og víst tykkara dygdir, tað hevði verið sunt fyri tykkum, og tað kundi verið hugaligt at sæð, hvussu samfelagið hevði blómað og inntøkuskapanin økt ár um ár undir tykkara kreativu heilum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Tað, sum peikar niðureftir. fer at peika uppeftir,

Ella nýskapan í okkara blaðheimi, sanniliga!

Rolf Guttesen
1. June 2004

Í farnu viku hevði Sosialurin nakrar stórt uppsettar greinar um fyrstu 100 dagarnar hjá nýggja Landsstýrinum. Soleiðis plaga teir eisini at gera í Amerika.

Tveir tíðindamenn, Heini og Páll, sum tykjast at dáma væl at skriva saman, høvdu funnið gamlar notatblokkar fram. Og meðan annar lýsti við petroleumslampuni, baksaði hin við at spíska ein blýant. Í Amerika arbeiða blaðmenn eisini ofta saman, tveir og tveir.

Úrslitið av hesi co-production í føroyska blaðheiminum, má ongantíð gloymast. Tí her hendi veruliga nakað. Her vóru hegnspelar fluttir, so tað sást. Tað sum eingin annar hevði tonkt, kom her á blað. Hetta var djúptgangandi og nærsøkin 'journalistikkur' ella blaðmannakynstur.

Sum nakað heilt genialt, høvdu hesir garpar, við sveitta og stríð, funnið ta mest róttøknu loysnina. Best var at fara í máltráðin, og seta monnum og kvinnum, sum hava vald og ávirkan í samfelagslívinum, ein sera einfaldan, men sera djúpan spurning:

"Hvat halda tit um samgonguna". Vitsnjallingarnir Heini og Páll, ella vóru tað Páll og Heini, ilt er at avgera hvør ið setti ljós-kastaran á henda ástøðisfasta verkevnisspurning:

"Hvør skal spyrjast". Hvat ið meinigi maðurin á gotuni ella í køkinum meinar, tað hevur slett ikki nakran áhuga. Jú har var Ingeborg, forkvinna í Arbeiðarafelagnum, Jan stjóri í Vinnuhúsinum hjá arbeiðgevarunum, so var tað formaðurin í Búskaparráðnum.

Men hví bert spyrja øll hesi, sum umboða keðilig feløg og stovnar. Nei, vit mugu eisini spyrja nakrar, sum hava forstand uppá tingini. Teir, sum eru støðið undir andríka prátmentanina í landinum. Vit taka sjálvandi Helga í Útvarpinum og Ingolf í Sjónvarpinum. Teirra politiska áskoðan kann verða avgerandi fyri Føroyaland. Hjálpa vit teimum framat, so verða vit helst ikki gloymdir eina aðru ferð. Tað er neyðugt at hava slíkar góðar menn við, annars tíma fólk ikki at lesa blaðið. (Tað er eisini nógv lættari at spyrja ein journalist, ha?)

Men fyri at gera skapanarverkið fullfíggjað, funnu blaðmanna-tvíburðarnir uppá nakað, sum eingin hevur havt hugflog til fyrr:

"Vit spyrja Høgna Hoydal!" Hann hevur aldrin svikið! Hann hevur eisini verið sjónvarpsmaður, so har eru vit aftur á tryggari grund. Hann, sum vísti Føroya fólki, hvussu man í dokumentarsending kann fáa nógv burtur úr lítlum. Hann skal við ósvikaligum ímyndingarevnum sínum siga okkum tann guddommiliga, óreingiliga sannleikan um hesar 100 dagarnar hjá Landsstýrinum.

Og virkuliga, eg las Høgnasa vælvældu, krúllutu og beinraknu orð, sum eg noyðist at endur geva in extenso (fullum líki). Maðurin í bosinum opinberar fyri okkum:

"Samgongan hevur eina vinglutta bakkingarkós". Samgongan er sum eitt skip, sum bakkar. Hetta líknilsi kundi verið tikið úr Bibliuni. Hetta er sanniliga beinrakið. Vit, sum hildu at tað gekk spakuliga frammá, kanska nakrar strikur í stýriborð ella bakborð, hava verið púra blind. So hetta verður eitt gott peilimerki at hava í framtíðini. Sum hakað heilt nýtt læra vit, at kósir ikki bert eru kumpass-kósirnar, men tað at bakka eisini er ein kós. Onkunstaðni millum landssynning og sunnan stendur nú "bakka". Vit læra eisini ikki at vera innbilskur, men lurta eftir hvat autoriteturin á økinum hevur funnið í Opinberingini. Heldur lurta eftir manninum í bosinum, sum sær at nú skúmar afturi undir hekkuni. Tað er gott at verða mintur á, at nakað er progressivt og nakað er bara bakk.

"Aðalmál Tjóðveldisfloksins eru øll skúgvaði til viks". Ja, tað má undra ein sunnan heila, at fornuftig fólk, sum blivu vald á ting, ikki automatiskt hildu fram við tí reinu konservativt-nationalistisku verkætlanini, sum "sjálvstýris-rørslan" enn hevur sum stevnumið. Einaferð vóru øll jú samd um at fáa Førjamál aftur til æru. Men tað vóru danskarar, sum spiltu spælið, tí teir góvu alt ov nógv í stuðli. Peningarenslið fórdi til forstoppilsi, ella var tað mótsetta? Hetta nýggja Landsstýrið hevur ongar nationalistiskar visiónir. Tí skúgvaðu teir okkara hundrað ára gamlu og væl mosagrógvnu tanka-konstruktión til viks. Ófatiligt.

"Samgongan bakkar í búskaparpolitikkinum, sjálvstýrispolitikkinum og mentanarpolitikkinum hjá farnu samgongu". Ja, tað er bara heilt ófatiligt, at teir nú hava havt 100 dagar í Landsstýrinum, og enn er Blokkurin ikki avskaffaður. Grundlógin, sum hevur ligið næstan klár í 10 ár, hava teir heldur ikki meganað at fingið ígjøgnum enn. Og enn er einki føroyskt flagg uttan fyri ST-skrivstovuna í Nýggju Jórvík. Maðurin í bosinum hevur fingið samhugabrøv úr allari verðini og Íslandi, sum siga at øll høvdu elskað, at Merkið bleiktraði í milliónabýnum, býurin hevði virkuliga verið nógv penari upp á tann mátan. Einki hevði verið lættari hjá røttum monnum. Men hetta Landsstýrið, suff suff. Orakul-orð, sum bert ein maður við mystiskum evnum kann útleggja á rættan hátt

"Hetta eru øll øki, sum peika frameftir, men tey verða fullkomiliga niðurprioriterað"

Ja, dømikraftin hjá hesum dámliga tjóðveldismanni, sum stepp-dansar sum ein Fred Astair, og syngur føroyskar tjóðskaparsangir undir brúsuni, hvønn morgun (sbr. samrøðu í Sosialinum), hon er heilt í topp. Og tað, sum peikar niðureftir fer at peika uppeftir, um ikki tað verður frampriorieterð so panska umprioriterað (raðfest og fest á blað, tá hann hevur fest sær í). Eitt grúiligt skil.

Klárir setningar við substansi og klárum innihaldi. So kontant og beinrakið kann tað sigast. Hevur tú lisið henda boðskap frá manninum í bosinum, so ivast tú onga løtu. Og tøkk skulu úrmælingarnir báðir úr blaðmannaheiminum hava. Og so uppsetingin, hon var bara genial, líktisk lepum av gomlum vespappíri. Tað má kunna brúkast um aftur.

200 musikkskúlanæmingar missa undirvísing

Føroya Musikkskúlalærarafelag heitir inniliga á politikararnar um at hækka játtanina til Musikkskúlan. Við játtanini sum er, verða 4,5 lærarastørv spard burtur

YVIRLÝSING

Í yvirlýsing ger Føroya Musikkskúlalærarafelag greitt, at játtaða upphæddin til Musikkskúlan fer at raka umleið 200 næmingar, tí 4,5 lærarastørv skulu sparast burtur. Felagið vil tí hava løgtingið at koma við eini eykajáttan á ólavsøku. Yvirlýsingin er soljóðandi:

»Í sáttmálanum millum Fíggjarmálarráðið og Føroya Musikklærarafelag eru ásettar lønarhækkingar, eins og í øðrum sáttmálum.

Tíverri endurspeglar løgtingsfíggjarlógin fyri 2004 ikki hesar lønarhækkingar og musikkskúlaskipanin er tí noydd at repa seglini.

Føroya Musikklærarafelag vil við hesari yvirlýsing gera vart við, at avleiðingarnar fyri musikkskúlavirksemi kring landið eru sera álvarsamar.

Sambært musikkskúlaleiðaranum verður skúlin noyddur at skera 4,5 fulltíðarstørv burtur. Hetta rakar hópin av næmingum. Umleið 200 næmingar, ið hava fingið tónleikafrálæru í styttri ella longri tíðarskeið, noyðast at fáa tey tungu boð, at tónleikafrálæra teirra er skorin burtur.

Musikklærarar standa spyrjandi. Vit hava veruliga haft ta fatan, at politikkarar vilja hava ein vælvirkandi musikkskúla um alt landið. Her er neyðugt at vísa á, at ein ikki fær ein vælvirkandi skúla við námsfroðiliga nøktandi frálæru, tá ið skúlin veksur nógv í uppgangstíðum, fyri síðani at tveita alt fyri borð, tá ið strammar at figgjarliga.

Vit ynskja heldur eina støðuga og ábyrgdarfulla menning av skúlanum, og ein slíkan vøkstur, at skerjingar ikki gerast neyðugar í verri tíðum.

Høvuðstankin við musikkskúlalógini er, at Føroya Musikkskúli skal vera eitt tilboð til alt Føroya fólk.

Um ikki landspolitikkarar og embætisfólk vísa ábyrgd fyri Føroya Musikkskúla, er stórur vandi fyri at høvuðsendamálið við skúlanum dettur fyri bakka.

Sum sagt, hava vit ta fatan at politikkarar úr øllum flokkum, vilja Føroya Musikkskúla væl. Okkara áheitan er tí á Løgtingið um at koma við einari eykajáttan á ólavsøku, so uppsagnir ikki gerast neyðugar, og allir næmingar kunnu halda fram komandi skúláár.«

Kvinnukvøld í Vágum

Mikukvøldið verður hugnakvøld fyri kvinnur á Hotel Vágum. Tað skal takast bókstaviliga, og menn hava yvirhøvur ikki atgongd

TILTØK

Skipað verður fyri kvinnukvøldi á Hotel Vágum mikukvøldið. Tað eru fyrituøkur í Vágum, sum fara at sýna fram ymiskt, tær hava at bjóða, eins og undirhald eisini verður.

Hárfríðkanarstovan hjá Janitu í Sandavági fer at siga frá um hárrøkt, sigur Kunningarstovan í Vágum í tíðindaskrivi. Kára á Steig í Sandavági fer at siga frá um húðrøkt, eins og handilin há John Poulsen í Vatnsoyrum verður umboðaður, har greitt verður frá um kvinnundirklæði. Eisini fer fólk frá Ursmiðuni í Sørvági at greiða frá, hvussu farast kann fram, tá ein skal velja sær sólbrillur.

Marjun Kálvalíð í Miðvági fer at greiða frá um kost og lívsvirði, og Erla og Lovinda fara at syngja.

Til matna verður smyrjibreyð at fáa, sigur Kunningarstovan, og atgongumerkini, sum kosta 120,-krónur, eru at fáa í teimum handlunum, sum við eru, eins og tey eisini kunnu keypast í Kuningarstovuni í Miðvági.

ej

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2